## Danskur milliarderur á húsagang



Fyri fáum vikum síðani var hann milliarderur og ein av ríkastu monnum í Danmark. Í dag er alt ríkidømið burtur. - Ein góður lætti, sigur tann 53 ára gamli, og nú fyrrverandi ríkmaðurin, Peter Forchammer. Hann hevur luttikið í mongum verkætlanum, t.d. Dansk Formueforvaltning, Sunny Tours, Nordsjælland Sommerpark. Her hevur hann hevur forvunnið stórar upphæddir við sølu av partabrøvum í ognarfeløgum, men nú er hansara stóra ognarfelag, Synerco ApS, farið á húsagang.

## Samstarv um fornminni

Sambandið millum veðurlagsbroytingar og árin teirra á fornminni og mentanarumhvørvi í Norðurlondum er nú sett á dagsskrá. Norðurlanda Ráðharraráðið hevur nú veitt fígging til eitt samstarv millum fornminnafyrisitingarnar í Norðurlondum. Verkætlanin skal fremja og økja samskifti um kunnleika og royndir millum norðurlond. Í Føroyum eru mong sjónlig dømi um, at landslagið er broytt sum frá er liðið, í fleiri førum sum úrslit av veðurlagsbroytingum, eitt nú skriðulop. Nógv dømi eru kring um í oyggjunum, har fornar bústaðaleivdir forfarast tí at lendið fram við sjóvarmálan máar. Símun V. Arge, deildarleiðari á Føroya Fornminnissavni, umboðar føroyska partin í verkætlanini.

# og færri





## Føroyski fiskiflotin er 28 ára gamal í miðal

**Vit halda okkum ivaleyst hava ein nútímans fiskiflota, men sannleikin er, at hesin floti á pappírinum er rættiliga gamal – við 28 heili árum í miðal**

FISKIFLOTI

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Føroyski fiskiskipaflotin er 28 ára gamal í miðal. Vit hava einki at samanbera við, men tað skerst ikki burtur, at okkara floti er eldri, enn flestu munnu geva sær far um - ja, kanska nógv eldri enn tað.

### Garnaskip elst

Elstu skipini í fiskiflotanum eru garnaskipini við heili 41 árum í miðal. Fleiri av hesum skipum hava áður verið í øðrum vinnum og eru umbygd til garnaveiði.

Vit kunnu taka eitt tilvildarligt garnaskip, sum áður var kenda saltfiskaskipið Hans Erik.

Hans Erik er smíðaður á Skála Skipasmiðju í 1969, og hóast hann soleiðis er út við 40 ára gamalur, er skipið nýggjari enn miðal.

Hóast høga aldurin, taldist manningin á Nim fyri nøkrum árum síðan millum tær manningar, sum stóðu fyri størstu inntøkunum.

Tað er tí minni enn so altíð, at aldurin sigur nakað um, hvussu inntøkan vignast. Hinvegin má roknast við, at manningarumstøðurnar umborð á nýggjari skipunum eru betri.

Flestu skip eru tó umbygd og summi fleiri ferðir, og her hevur ikki minst verið hugsað um umstøðurnar hjá manningini.

### Gomul línuskip

Línuskipini, sum hava teir flestu fiskimenninar umborð, eru næst elst í røðini av skipabólkum í fiskiflotanum.

Miðalaldurin hjá línuskipum er 37 ár, men hesi eru tey flestu umbygd við nógv bøttum umstøðum hjá manningunum.

Línuflotin hevði eitt sera gott ár í 2003, og onnur ár hava eisini vignast rímiliga væl. Hetta hevur gjørt, at reiðarar fóru at brúka pening upp á umbyggingar, sum so aftur hevur elvt til, at samlaða skuldin er vaksin.

Nú gongur tó verri hjá hesum skipabólki, og í dag hevði eingin peningur verið til umbyggingar og nútímansgerð av okkara línuskipaflota.

### Aðrir skipabólkar

Verksmiðjuskipini eru nýggjastu skipini í okkara fiskiflota, og teimum á baki koma pelagisku skipini.

Verksmiðjuskipini eru í miðal 15 ára gomul og pelagisku skipini 16.

Trið nýggjastu skipini í flotanum eru rækjuskipini, sum eru 19 ára gomul í miðal.

Í løtuni verða tvey nýggj skip smíðað til pelagisku vinnuna; annað er ein nýggj Norðborg, hitt ein nýggjur Tróndur í Gøtu.

Tá nýggju pelagisku skipini eru komin í flotan, fer miðalaldurin í hesum skipabólki at lække munandi, tí hesi skip eru ikki so mong í tali.

Aldurin hjá okkara partrolarum og lemmatrolarum er nøkulunda hin sami.

Lemmatrolararnir eru 25 ár í miðal og partrolararnir 23 ár.



*Meðan garnaskipini eru elstu skipini í fiskiflotanum við sínum 41 árum í miðal, eru línuskipini 37 ára gomul í miðal*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*